Vikuskiftis Sosialurin

Nr. 183 - 25. september 2009

# Havstovan skaðar Føroyskan fiskaútflutning

Seinastu tíðina hevur Føroya Reiðarafelag viðgjørt fiskidagaskipanina á heimasíðu síni. Samstundis skrivar LÍÚ (Íslendska Reiðarafelagið) á síni heimasíðu um ein fyrilestur ið stjórin á Føroysku Havstovuni Hjalti í Jákupsstovu helt í Reykjavík. Hendan grein bar brá av at stjórin á Havstovuni tekur ikki undir við føroysku fiskidagaskipanini. Er hetta rætt so er hetta eitt álvarsmál !

Til tíðir heldur vinnan at Havstovan ikki kennir sína vitjunartíð, og at stjórin á Havstovuni tosar meira um politikk og strategi heldur enn at halda seg til tað hann er settur til, nevniliga at meta um hvussu fiskastovnarnir undir føroyum eru fyri og ráðgeva hareftir. Stjórin á Havstovuni úttalar seg um strategisk evnir, búskap og fiskivinnusamráðingar. Sum fiskifrøðingur skuldi hann hildu seg til sítt øki.

Stjórin á Havstovuni tosar um hvussu Føroyar skulu fyrihalda seg í komandi millumlanda samráðingum um makrelin. Hetta skuldi hann latið strategarnar í fiskimálaráðnum tikið sær av. Eisini kemur hann fram við pástandum um at tað eru gjørdar ovurhánds íløgur í okkara heimaflota, sum fiskifrøðiligur stovnur, hevur Havstovan ikki til uppgávu at greina okkara fiskiflota og lønsemið hjá flotanum. Tað er ikki teirra arbeiðsøki. Í lógini um vinnuligan fiskiskap er greitt tilskilað, at Havstovan hevur ábyrgdina av at geva landsins myndugleikum ráð um støðuna hjá teimum stovnum, føroysk fiskiskip troyta.

**Stjórin á Havstovuni undirgrevur okkara fiskireguleringsskipan**

Á heimasíðuni hjá Íslendska Reiðarafelagnum, **LÍÚ** verður ein norðurlendskur fundur viðgjørdur, har eitt evni var reguleringsskipanir. Tað sum teir serliga hava lagt til merkis, og tað sum stendur eftir, er fyrilestrinum hjá stjóranum á føroysku Havstovuni, har teir endurgeva ein part av fyrilestrinum hjá honum á teirra heimasíðu.

"Fiskidagaskipanin sum verður brúkt at stýra fiskiskapinum undir Føroyum gevur ikki tað ætlaða úrslitið. Tað sum sæst í dag er ov stórar íløgur, vánalig gongd í flotanum og vánalig støða í fleiri týðandi fiskastovnum., serliga toskinum sum hevur kollapsað seinni árini. Hjalti segði í sínum fyrilestri frá Føroysku royndunum av fiskidagaskipanini. Hann segði at ikki eydnaðist at fáa semju um kvotaskipan og tí var verandi skipan sett í verk, sum allir sjómenn og reiðarar vildu hava í sínari tíð. Úrslitið hevur verið vánaligt. Eina av álvarsligastu fylgjunum av fiskidagaskipanini í Føroyum helt Hjalti vera, at stýringin av royndini eftir ávísum fiskasløgum var fulkomiliga miseydnað.

Orsakað av minkandi fiskiskapi legði flotin seg eftir at fiska tann dýrasta fiskin. Tað hevði við sær ov stórt veiðutrýst á toskastovnin við tilhoyrandi avleiðingum. Toskafiskiskapurin undir Føroyum er munandi minkaður seinastu árini.

Hjalti tók samanum í endanum av fyrilestrinum og segði at størsti fyrimunurin við fiskidagaskipanini var at reglurnar vóru betur yvirhildnar og minni útblaking. Vansanir vigaðu tó meir. Veiðurættindi vóru tódnað, saman við ov stórar íløgur í effektivari skipum við tilhoyrandi tekniskari betran og øktum effektiviteti, stór



sving í veiðu og at rakstur av fiskiveiðufyritøkum var órentabul."

Stjórin á Havstovuni hevur eftir okkara tykki, skyldu til at draga fram bæði vansar og fyrimunir við okkara fiskidagaskipan. Fyrimunirnir sum vit ikki síggja nevndar eru, stór gýtingarfriðaði øki, avmarkað troling innanfyri 12 fjórðingar og stór økir friðaði fyri troling alt árið. Teir fyrimunir íð her eru nevndir áttu at hjálpt føroyskari fiskivinnu at fáa okkara fisk umhvørvisgóðkendan. Tað er sera óheppið at onnur sita eftir við tí fatan at stjórin í Havstovuni tekur ikki undir við okkara fiskidagaskipan, sjálvt um hann var ein av teimum sum evnaðu hana til.

Tá tosað verður um ov stórar íløgur er eitt sindur margháttligt at geva fiskidagaskipanini skyldina fyri tað. Hyggja vit eftir teimum londum sum nýta kvotaskipanir, sæst at okkara íløgur eru fyri einki at rokna í mun til t.d. Ísland.

Eftir okkara meting er fyrilesturin hjá stjóranum á Havstovuni, reinur politikkur.

Pástandurin er, at skipini hava gjørt íløgur sum hava effektiviserað skipini so nógv, at stovnurin er niðurfiskaður. Hetta er púra burturvið. Hendan neiliga viðgerð av okkara fiskidagaskipan hevur eisin ført til at ICES ikki góðtekur okkara veiðu sum burðardygga og harvið hava føroyar í dag trupulleikar av at selja okkar fiskavørur á evropeiska marknaðinum, hetta er ein beinleiðs avleiðing av teimum signalum, Havstovan sendir út.

**Húkaflotin sera gamal**

Effektivisering hevur verið, men pástandurin um tað sera stóru effektiviseringina er ikki rættur. Hesin spurningurin hevur verið kannaður av óheftum persónum, og niðurstøðan var greið. Tað er ikki so nógv effektivisering farin fram, sum róð verður framundir.

Minnt skal vera á, at ein stórur partur av íløgunum er farnar í at gera umstøðurnar betri hjá manningini, tey flestu skipini eru sera gomul og ótíðarhóskandi. Linuskipini eru í miðal meira enn 40 ár og útróðrarbátarnir eru munandi eldri, tann samlaði føroyski húkaflotin stendur í minni pengum en til dømis 5 nýggj línuskip kosta. Her er veruliga talan um "undur investering" og ikki yvir investering.

**Fiskidagskipanin í dag**

Føroya Løgting hevur samtykt at vit skulu nýta eina fiskidagaskipan heldur enn eina kvotaskipan. Hetta merkir at politiska skipanin sigur at hetta er leisturin og kann man sum alment settur embætismaður ikki fylgja hesum, so er bert eitt at gera og er tað at finna sær annað starv. Undanfarni fiskimálaráðharrin Jørgin Niclasen, hevur ferðast víða um og greitt sera væl frá, teimum dygdum, ið fiskidagaskipanini hevur.

Tá fiskidagaskipanin kom í gildi í 1996 vóru tað umleið 41.000 fiskidagar í skipanini. Í seinasta fiskiárið vóru tað umleið 32.000 dagar í fiskidagaskipanini, men av hesum vóru einans brúktir umleið 14.500 dagar. Tey seinastu árini eru tað einans brúkt umleið 40-50 % av tillutaðu døgunum um árið, so veiðutrýstið hevur verið sera lágt tey seinastu árini. Men vilja dagarnir og veiðan økjast aftur, tá meira fiskur er til. Hetta er jú ætlanin við skipanini. Men tað tykist vera sera torført at skilja ella viðurkenna hetta.

**Hví kom fiskidagaskipanin**

Orsøkin til at fiskidagaskipanin kom, var at kvotuskipanin, sum í 1994 var smoygd niðuryvir høvdi á okkum (av fiskifrøðingum og donskum embætismonnum) brendi fulkomuliga saman um várið 1996 sjálvt um kvoturnar eftir toski vóru útvið tvífaldaðar fra 6.500 til 12.000 tons. Tað bar snøgt sagt ikki til at fiska t.d. hýsu, upsa, longu og brosmu, tí toskatilráðingin var so lítil.

Tilráðingar frá fiskifrøðingum komu, ið søgdu at tað skuldi verða fiskastopp eftir toski, samstundis sum fiskimaðurin sá at havið var fult av toski.

Her sóu øll, at neyðugt var við heilt øðrum munagóðum amboðum og var fiskidagaskipan sett í verk í 1996. Fiskidagaskipanin var høvuðsorsøkin til, at vit kundu framleiða okkum úr føroysku búðskaparkreppuni frá 1992-93. Bæði vinnan og fiskifrøðingar viðmælti hesa skipan og var alttjóða viðurkendi fiskifrøðingurin Kjartan Hoydal, ið tá var aðalstjóri í fiskimálaráðnum formaður í nevndini íð tilevnaði skipanina, Reiðarafelagið og stjórin á Havstovini Hjalti í Jakupsstovu vóru eisini við í nevndini.

Vit eru stoltir av at hava hesa fiskireguleringsskipan við ongum ólógliga veiddum fiskasløgum og harvið ongari útblaking. Hendan skipan ger, at vit kunnu gagnnýta okkara fiskatilfeingi optimalt. Við at veiða stóran part av okkara toski og hýsu við eldri og bíligum skipum hava vit heimsins mest burðardyggu fiskivnnu og mest orkusparandi toska og hýsuveiðu í heiminum.

*Klaksvík tann 21.09.2009*

**Óli M. Lassen, næstf. í Felagnum Línuskip**

**Auðunn Konraðsson, Formaður í Meginfelag Útróðrarmanna**

**Jákup Sólstein, fyrrv. formaður í reiðarafelagnum**

---

tað fór at merkjast.

Og vit mugu tíverri ásanna, at tað var júst tað, sum hendi. ABC-landsstýrið leitaði beinanvegin aftur á gamlar gøtur. Ongin skuld varð niðurgoldin, onki spart upp, men ístaðin veittu teir skattalættar fyri 400 milliónir krónur árliga og høvdu harfturat eina ólogliga meirnýtslu uppá 340 milliónir, sum vit í dag skulu gjalda fyri hvørt ár. Hetta svarar júst til tað undirskotið, vit hava á fíggjarlógini í dag. Verri var, at skattalættarnir oystu bensin á ein búskap, ið longu var nóg heitur. Allir kostnaðir ruku upp, og forðað var fyri at taka inn útlendska arbeiðsmegi. Hetta var uppskrivtin uppá búskaparliga niðurgongd.

**Gerðabýtispolitikkurin endurføddur**

Tá fólkið í landinum hevði niðurgoldið uttanlandsskuldina og tvær ein hálv milliard varð sett á bók, fóru vit aftur bara at fremja gerðabýtispolitikk. Handan afturlatnar dyr vóru sonevndar "semjur" gjørdar millum flokkar, ið onki mál ella kós ella grundgeving høvdu uttan tað, at tað vóru "semjur". Og onki orðaskifti varð møguligt. Talaði nakar at ella mælti til aðrar ætlanir, varð farið eftir persóninum og sett spjaldur á teir. Peningur varð oystur út í skattalættum, ovurnýtslu og bardagar um prestisjuprosjekt, hóast búskapurin varð við at byggja seg upp í eini rímiligari javnvág. Almenn ogn varð seld og eisini tann peningur nýttur, hóast samtykt at varð, at peningurin skuldi í grunn til framtíðina.

**Føroyar sum eitt akvarium**

Ongin broyting varð gjørd í serskipanum ella kreppuloysnum og bygnaði – og ongin gongd sett á nýggjar útbyggingar í økir, ið kundu skapa varðandi virðir. Tilfeingisumsitingin helt fram óbroytt, hóast øll serfrøði vísti, at stórar broytingar vóru neyðugar til tess at endurskapa virðini – og felags ogn varð keypt og seld og kapitalur tikin úr vinnuni til einstaklingar.

Ongi mál vórðu sett til at skipa Føroyar frælsar og skapa okkum atgongd til heimssamfelagið. Alt varð parkerað. Ístaðin var aftur handlað eins og Føroyar skulu vera eitt akvarium, har fóðrað verður niður gjøgnum eitt lítið hol í glasloftinum. Og so varð fóðrað ov nógv, so alt fór at køvast. Heldur enn at taka veggirnar niður, so vit kunnu virka saman við heimsins tjóðum og og heimurin kann koma til okkara.

**Leiðsluloysi og málloysi**

Vit mugu bert ásanna, at vit seinastu árini hava ligið í leiðsluloysi, málloysi og hugsjónarloysi í føroyskum politikki – og at vit tíverri hava endurtikið somu mistøk aftur og aftur.

Vit liva í dag av tí, sum varð spart og niðurgoldið undir fullveldispolitikkinum. Men tann sjónleikurin frá sambandinum, vit síggja í dag, hevur bara til endamáls at leggja ábyrgdina frá sær fyri sínar skeivu avgerðir og at siga, at einar 100 milliónir úr Danmark skulu bjarga okkum. Vit skulu gerast bangin, undirbrotlig – og vit skulu ikki halda okkara egnu politikarar til svar fyri tann førda politikkin.

**Læran av kreppunum**

Men vit hava lært, at tað, sum skapar kreppur í Føroyum í nýggjari tíð, hevur ongantíð verið ov lítið av peningi. Tað hevur hinvegin verið ov nógvur peningur. Tá ov nógvur peningur hevur verið sprændur út í skipanir, ið annars kundu ment seg sjálvar, men sum køvast av skeivum avgerðum. Tá peningur, sum ikki hevur varðandi virði ella veruliga framleiðslu og botn aftanfyri seg, hevur verið hildin at verið grundarlagið fyri vælferð. Ov nógvur peningur, sum er nýttur skeivt í jagstran eftir persónligum løtuvinningi ella fiktivum virðum til fáar úrvaldar bólkar. Okkara royndir eru, at kreppurnar eru skaptar, tá felagsskapurin og samhaldsfestið hava verið offrað fyri egingirndina.

Og vit hava lært, at tíðin má vera farin frá teimum, sum prædika, at trygdin hjá okkara pensjónistum, sjúku og veiku, liggur ikki í tí sum, tey sjálv hava skapt av virðum og í tí sum vit sjálv gjalda til felagsskapin – men at tað skal grundast á pening aðrastaðni frá, ið vit ikki hava ávirkan á. Og at vit so ístaðin skulu kunna nýta pengar frá okkara egnu framleiðslu til persónlig prestisjuprosjekt og størri fyrimunir til tey vælbjargaðu.

**Heimskreppan sama avbjóðing**

Tann áleikandi heimskreppan hevur lært okkum – og vónandi heimsins tjóðir allar – somu greiðu setningar. Ein fíggjarheimur hevur troðið ein villan dans um øll heimsins lond, ið hevur verið bygdur á at flyta íspunnin virðir á færri og færri hendur, meðan ongin verulig framleiðsla og virðir hava verið aftanfyri. Onki fólkaræðið ella fólkavalt eftirlit hevur havt minsta tamarhald á hesum blindu kreftum. Tá dansurin ikki slapp longur út í ytstu krókar og økta ferðin ikki kundi føðast við nýggjum fiktivum virðum, kann dansurin nú ikki troðast undir moldum.

Eftir liggur rokningin hjá felagsskapinum og verri er hjá breiðu fjøldini at leika fagurt á foldum. Fólkaræðið skal taka upp eftir neoliberalu ódnina, ið hevur snýst so mangt omanav. Og fátækasta fjøldin ber higartil dýrasta prísin.

Tað er hetta, vit skulu stríðast ímóti í dag – og tað er hetta vit skulu nýta orkuna til. Heldur enn at góðtaka ta gomlu sambandsundirbrotlig heitina, sum hvørja ferð leiðir okkum til stillstøðu og afturgongd.